Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Farleiðin frá flogvøllinum gjøgnum bygdirnar í Vága kommunu

Spurningar:

1. Hvussu nógvir bilar koyra ígjøgnum bygdirnar í Vága kommunu árliga?
2. Hvussu stór er ferðslan samanborið við onnur vegastrekkir í Føroyum?
3. Hevur Vága kommuna heitt á Landsverk um at virka fyri loysnum á ferðsluni gjøgnum bygdirnar Miðvág og Sandavág?
4. Hevur Landsverk biðið um pengar á fíggjarlógini til at gera ferðsluátøk saman við Vága kommunu á hesum vegastrekkjum?
5. Er landsstýrið vitandi um, hvørjar ætlanir Vága kommuna hevur á økinum?
6. Er nakað samskifti um eina fyribils felagsloysn á ferðsluruðuleikanum?
7. Nær er ætlanin at gera eina varandi loysn á ferðslutrýstinum til og frá Vága Floghavn?
8. Við økta ferðafólkatrýstinum um flogvøllin frameftir, metir landsstýriskvinnan so, at farleiðin til og frá flogvøllinum er nøktandi fyri borgararnar í Vága kommunu?

Viðmerkingar:
Ferðafólkatalið um flogvøllin bara økist. Útbyggingarnar av Vága Floghavn gera, at ferðafólkatalið væntandi røkkur 1 mió. fólk um nøkur ár. Hetta leggur stórt trýst á vegakervið til og frá flogvøllinum.
Økta ferðslan koyrir gjøgnum tvær bygdir í Vága kommunu, Miðvág og Sandavág. Hetta eru bygdavegir, sum krevja, at ferðsluforðingar og tálman av ferðsluni er neyðugt, um fólk skal búgva fram við høvðusvegnum.
Vága kommuna hevur víst á avbjóðingina og hevur ætlanir, men enn hevur Landsverk, sum eisini er vegamyndugleiki á hesum vegastrekki, ikki gjørt stórvegis. Hetta eru fyribils ferðsluátøk, tí øll eru óivað á einum máli um, at ein varandi loysn má finnast. Hetta kann gerast, við at leiða ferðsluna frá flogvøllinum og tunga ferðslu annars, uttan um bygt øki. Nakrar tunnilsloysnir eru á borðinum, men enn er onki alment ítøkiligt, uttan tær tunnilsloysnir, sum Landsverk hevur á raðfestingarlistanum. Ein loysn er ein tunnil millum Vatnsoyrar og Fútaklett. Ein onnur loysn er tunnil um Hálsin og tunnil ella vegur til Miðvágs norður á Vatn.
Fyri at fáa at vita, hvat ætlanin ítøkiligt er at gera her og nú á hesum vegastrekki, og fyri at vita, nær ætlanin er at gera eina varandi loysn, verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 10. desember 2025

Jóhannis Joensen